# Kjak



Annita á Fríðriksmørk

## Komið nú til arbeiðis, sambandsfólk!

Tað átti at verið ringt at siti hendur í favn og skriva. Men tað megna sambandsfólk. Tey hava síðani 2001 sitið hendur í favn og skrivað um blokkstuðulsniðurskurðin.

Hetta gera tey tí tey siga seg trúgva uppá, at tað er blokkurin sum skapar virðini í Føroyum.

Men sjálvandi í einum landi við trúðarfrælsi, mugu tey kunna trúgva tí tey vilja. Bara ergriligt at ein manning, sum skal eitast at stýra landinum sleppur so lætt.

Ongin av teimum skrivar um broytingar í fiskivinnupolitikkinum. Sjálvt um broytingar har kundu givið landskassanum hundraðtals milliónir afturat. Tey gera onki við kommunusamanleggingina, hóast tey glaðbeint lótu landsstýrisfólkini seta ein bólk fyri og annan eftir at skriva álti um kommunumál. Skúlareformin taka tey ikki uppá tunguna. Miðfyrisitingina hava tey onga meining um. Og búskapin hava tey mist alla vón um...

Alt samalt tí blokkurin varð skorin í 2001!

At fáa nakað boð frá landsins leiðara um broytingar og betringar og gongdar leiðir hevur ongin nakrar vónir um, hvørki í samgonguni ella í andstøðuni. Og hetta finna sambandsfólk seg eisini í. Bara tey sleppa at skriva um blokkstuðulsniðurskurðin í 2001.

Tey trútta dag og dagliga niður í fólk um, at rótin til alt ilt í Føroyum er blokkstuðulsniðurskurðurin í 2001, tí man tá onki skuldi seta í staðin. Hetta siga tey hóast inntøkurnar til landskassan frá skatti og avgjøldum eru øktar við eini milliard síðani 2001, ella við øðrum orðum, so eru inntøkurnar øktar tríggjar ferðirnar blokkstuðulsniðurskurðin! Eisini um vit taka skattalættarnar við, sum ABC flokkarnir í óðum verkum settu í gildi fyri fáum árum síðani.

Men um nú blokkstuðul var rótin til alt gott, hvussu ber tað so til, at Grønlendingar, sum fáa ein blokk, sum er góðar fimm ferðir størri, enn tann, sum føroyingar fáa, kortini hava størri hall á teirri fíggjarlóg enn vit hava, og nógv størri sosialar trupulleikar?

Og um vit sóu fyri okkum at vit fimmfaldaðu blokkin og fingu eins nógv og grønlendingar fáa í blokki. Halda sambandsfólk so, at vit høvdu loyst allar trupulleikar á sjúkrahúsverkinum almannaverkinum og at vit høvdu fingið allar útisetarnar heim aftur.

Ella hvussu ber tað til, at sambandsfólk finna seg í at sita í samgongu og ignorera allar innlendis trupulleikar og ístaðin hava alt fokus á blokkstuðulsniðurskurðin í 2001. Hví bjóðar man seg fram at stýra landinum, tá ið man sigur seg onki kunna gera, tí blokkurin er skorðin.

Er tað nú ikki uppá tíðina, at Sambandsflokkurin fer til arbeiðis. Tey hava sitið við valdið í 6 ár, og sita Gud hjálpi tú mær enn og pilka við triðingin, sum tíbetur varð skorin av blokkinum. Slíkt apati er ábyrgdarloysi og hevði undir vanligum treytum fingið avleiðingar.

Blokkstuðulin er gjald frá dønum fyri, at teir hava vald á okkara fullveldi. Í so máta eru góðar 600 mio kr peanuts. Onki annað land í heiminum hevði funnið uppá at latið 279.000 ferkilometrar til annað land fyri eina góða hálva milliard árliga. Slíkt er ikki til sølu í londum,har borgarar hava virðing fyri sær sjálvum.

Men sambandsfólk siga at jú meira vit fáa í blokkstuðli, jú betur eru vit fyri. Javel, so er Grønland kanska bara undantakið í regluni, og støða Føroya sum t.d. í nítiárunum fór á heysin við fullum blokki somuleiðis undantakið. Men ongin regla uttan undantak, - bara ergriligt at onki dømi í hesi teori prógvar regluna.

Blokkstuðulin er 5% av BTÙ sambært búskaparfrøðingum og búskaparráðnum. 5%! Tað er eitt klípi - ella ein pirra, sum onkur hevur tikið til. Tað sum dominerar í okkara búskapi er arbeiðsmarknaðurin og tað virksemi, ið har er, við fiskivinnuni og alivinnuni á odda, og tað umfar, sum hesar vinnur í høvuðsheitum virka og skapa í føroyska samfelagnum, og sum er grundarlagið undir øllum øðrum virksemi í landinum. Tað er føroyingurin, sum skapar virðini í samfelagnum. Tað er arbeiðskonan og maðurin, starvsmaðurin og konan, tað eru lærararnir, pedagogarnir og tey á sjúkrahúsunum, tað er fiskimaðurin og tey á brúnni, tað eru handverkararnir og tey sum leiða, og tey sum arbeiða sjálvboðið við alskyns frítíðarvirksemi, tað er mentanarvirksemi, ítrótturin, trúarlívið, bygdalívið og býarmentanin, sum mynda Føroyar. Tað eru hesi, sum eiga æruna fyri, at vit hava eitt samfelag, sum virkar, og sum mennist. Tað er tað føroyska fólkið, sum virkar og livir hvønn dag, sum skapar land okkara og mennir tað.

Hevði ynskt, at eisini Sambandsfólk trúðu hesum. So høvdu tey í øllum førum virt fólksins virksemi, meira enn tey hálóva tí lítla sindri, sum blokkstuðulin er.




**Viðvíkjandi koppingarevni fyri garnasótt 2010:**

**Apoteksverkið fer aftur í ár at avgreiða koppingarevni fyri garnasótt.**
Tað er alneyðugt, at allur seyðurin verður koppsettur, soleiðis sum landsdjóralæknin mælir til.

**Mannagongdin er nakað broytt í mun til í fjør.**

- Pakkað verður ikki til tann einkulta brúkaran. Ístaðin kann kundin biðja um talið av skamtum, hann hevur tørv á.
- Pakkað verða sett við 5 skamtum, 10 skamtum, 20 skamtum og 40 skamtum. Hvørt settið inniheldur: sproytur, nálir og leiðbeining umframt koppingarevni og jodspritt.
- Til ber at keypa/bíleggja vøruna á apotekunum: Norðoya -, Eysturoyar -, Suðuroyar- og Tjaldurs apoteki.
- Ynskir kundin vøruna til dyrnar, ber tað eisini til. POSTA tekur sær tá av flutninginum í køliboks og krevur peningin inn fyri hesa tænastu.
- Talan er um koppingarevni, ið ikki tolir hita. Tí skal koppingarevni goymast í kuldaskápi (2-8 °C) til tað verður brúkt.

Vøran er tøk frá mánadegnum 13.september 2010.

Apoteksverk Føroya




Martin í Grund

## Fundamentalisma og talibanar

Eg læs fyri stuttum eina grein um talibanar, ið høvdu, við vold, gjørt seg inná ein gentuskúla. Teir høvdu lopið á við gassi og tikið genturnar til fangar. Orsøkin, í hesum føri, var søgd at vera, at talibanar ikki vilja, at gentur fáa eina útbúgving.

Hetta førdi mínar tankar inn á teirra strangu lógir, sum t.d. at tað er straffbart at ganga í hvítum skóm, tí tað vanvirðir teirra flagg. Eg veit ikki nógv um burkuna, men tað tykist mær bæði ófatuligt og ógvusligt, at menniskju skulu goymast inni í eini burku.

Eftir at hava lisið nøkur lesarabrøv, bloggar o. a. síggi eg fleiri ferðir, at kristnir føroyingar verða kallaðir talibanar. Oftani er tað ógrundað, og eg haldi at slík samanbering er úti av lagi. Hon er vánalig, á lágum støði, og átti slett ikki verðið brúkt.

Eitt annað orð, ið mangan verður brúkt á undarligan hátt, er orðið fundamentalisma. Tá orðið verður nýtt, er tað aloftast í neiligum høpi, sum um, at tað er ringt at hava eitt grundarlag (fundament). Tað er tað jú ikki. Tað veldst grundarlag.

Jesus kom við einum líknilsi, har hann tosaði um tveir menn, ið skuldu byggja. Annar bygdi á sand og hin á klett. Altso, annar bygdi á eitt óvikandi grundarlag (fundament), meðan hin bygdi á vána grundarlag (fundament).

So, elskaðu fólk! Vinarliga gevist við at kalla hampafólk fyri talibanar, tað er skeivt.

Hoyrir tú onkran kalla ein annan fyri fundamentalist, steðga so á og hugsa, hvat grundarlag (fundament) viðkomandi sipar til, so at tú dugir at síggja, um tað er eitt gott ella vánaligt grundarlag, ið bygt verður á.